

*Ein av mest spennandi og torførastu kappingunum at rokna út hevur higartil í summar verið tann millum 6–mannaførini við monnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Jarnbardur bjóðar av í FM kappingini

## Lupu á bláman

Eingin vandi var á ferð, men tað sá eitt sindur ógvusligt út, tá ið 6–mannaførini við monnum komu á mál í Sandavági, ella kanska gjørdu landgongd, sum tað sá út.

Manningarnar royndu at fáa sum frægast burturúr, tá ið tær vóru á aldukambinum. Tá varð spurtað so nógv, sum tað bar til. Tað var stutt av endamálinum og inn á sandin. Menninir umborð á Lómi, 6-mannafarinum hjá Argja Róðrarfelag, spentu í, tá ið teir stutt frá málinum vóru á aldukambi, og áðrenn teir vistu av, var skúmandi sjógvur kring teir.

Tað sá eitt sindur ógvusligt út, tá ið tveir av manningini lupu fyri borð fyri at fáa bátin leysan aftur. Men har var eingin vandi á ferð.

**Men kortini er rættuliga ivasamt, um teir í Knørrafelagnum kunnu gera nakað við Smyril, sjálvt um teir leygardagin vunnu fyri aðru ferð í ár**

6–MANNAFØR MENN
*Jóannes Hansen*

Ein av mest spennandi og torførastu kappingunum at rokna út hevur higartil í summar verið tann millum 6–mannaførini við monnum. Smyril hevur verið roknaður sum størsti favoritturin, og vágbingar hava vunnið tríggjar róðrar. Men tað hevur fleiri ferðir myndast soleiðis, at tað ikki hevur verið fyrrenn á síðstu metrunum, at teir hava vunnið. Tí hevur tað verið rættuliga spennandi, bæði tá ið Smyril hevur vunnið, og tær tríggjar ferðirnar, tá ið hann ikki hevur vunnið.

Leygardagin vístu teir umborð á Smyrli aftur ógvusligan endaspurt, men teir vóru ov stuttir. Ella ov seinir at spurta, ber tað kanska eisini til at siga. Jarnbardur, sum vann á Jóansøku, var aftur hesa ferðina fyrstur á mál. Menninir umborð á Jarnbardi hava altíð staðið í skugganum av kvinnumanningini. Undanfarnu árini hava teir ongantíð vunnið. Men nú hava teir umborð á nýggja bátinum vunnið tvær ferðir.

Tey sjey stigini, sum teir fingu í Sandavági, bera við sær, at Jarnbardur ikki er heilt avskrivaður í FM kappingini. Men tað verður kortini tørført at røkka Smyrli. Vágbingar hava 36 stig, meðan Jarnbardur á næstfremsta plássinum hevur 32 stig. Kravið til teir umborð á Jarnbardi er sostatt, at teir vinna á Ólavsøku, og so skulu aðrir bátar hjálpa so mikið til, at Smyril verður trýstur aftur á í hvussu so er fjórða plássið. Tað tykist rættuliga óhugsandi, men tað ber ikki heilt til at avskriva møguleikan. Serliga tá havt verður í huga, at hjá Smyrli hevur tað fleiri ferðir ikki verið fyrrenn á teimum síðstu hundrað ella tvey hundrað metrunum, at teir hava bart seg úr miðjuni og fram í spíssin, og tá harafturat verður lagt, at málið á Ólavsøku verður væl styttri, enn málini hava verið higartil í ár.

Um Jarnbardur vinnur á Ólavsøku, og um Smyril verður nummar fýra, so fara bátarnir at standa javnir í stigum, og so verður Jarnbardur meistari, tí hann hevur betri úrslit í ólavsøkuróðrinum.

Men teir umborð á Smyrli plaga at svara aftur, tá ið tað ikki hevur hilnast so væl. Teir taptu fyri Páll Fanga á Fjarðastevnuni, og so vóru teir øgiligir í Kollafirði, teir taptu fyri Jarnbardi á Jóansøkuni, og so vunnu teir í rimmar endaspurti á Varmakeldustevnuni, og so er spurningurin, hvat teir fara at vísa á Ólavsøku, eftir at teir ikki vunnu í Sandavági.

### Skiftandi og tætt

Í Sandavági var rættuliga tætt millum teir mongu bátarnar. Enn eina ferð vóru teir umborð á Hvessingi bragdligir á fyrstu metrunum, og enn eina ferð duttu teir langt aftur í røðina. Sølmundur hevur ikki staðið seg nakað serligt higartil í ár. Hann endaði á fimta plássinum, men hann setti fitta løtu dám á, og saman við Stráluni, sum endaði á fjórða plássinum, var hann eina løtu heilt frammi í spíssinum.

Tá ið gott og væl hálvt málið var rógvið, fór stóra feltið at líkjast alt meiri tí, sum tað hevur verið undanfarnu ferðirnar. Páll Fangi og Jarnbardur vóru fremstir, og so varð bíðað eftir, hvat Smyril, sum rættuliga beskeðin helt seg afturi á fjórða plássinum, fór at gera. Smyril tók dyk á seg síðstu stóru hundrað metrarnar, og hann megnaði akkurát at leggja Páll Fanga afturum seg. Men hann megnaði ikki at gera nakað við Jarnbard. Munurin frá Jarnbardi og til Smyril var ein stórur skutur ella ein lítil hálv bátslongd, og frá Smyrli og aftur til Páll Fanga var munurin minni enn so.

Frá Jarnbardi og aftur til Sølmund á fimta plássinum var ikki ein bátslongd. So tað er møguleiki fyri nógvum vinnarum í ólavsøkuróðrinum. Men í FM kappingini eru tað bara tvey boð. Smyril er stórfavorittur. Spurningurin er, um Jarnbardur, sum leygardagin setti tingini upp á pláss, fer at gera nakað við vágbingar, tá ið Jarnbardur fer at rógva í heimasjógvi.

W W W . S O S I A L U R I N . F O



# Nólsoyingur hevur framvegis møguleikan



*Fyri aðru ferð í summar eydnaðist tað leygardagin Nólsoyinginum at vinna ein FM róður*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Í Sandavági varð enn eina ferð sjón fyri søgn, at teir umborð á Eysturoyingi trívast illa, tá ið tað er nakað at í sjónum**

10–MANNAFØR
*Jóannes Hansen*

Fyri aðru ferð í summar eydnaðist tað leygardagin Nólsoyinginum at vinna ein FM róður. Tey sjey vinnara stigini bera við sær, at Nólsoyingurin framvegis hevur møguleika fyri at vinna fyrsta FM heitið síðani 1989. Undan Ólavsøkuni eru fyritreytirnar greiðar, og tær siga, at tað ikki ber nólsoyingum sjálvum at gera av, um teir skulu vinna FM.

Nólsoyingurin er trý stig aftanfyri Eysturoyingin. Tað hevur við sær, at um nólsoyingar skulu hava nakran møguleika at vinna FM, so skulu teir vinna á Ólavsøku. Og so skal Eysturoyingurin ikki vera fremri enn nummar trý. So fær Nólsoyingurin sjey stig og kemur upp á 40, og Eysturoyingurin fær í mesta lagi fýra stig og kemur eisini upp á 40. Tá ið tað stendur á jøvnum í FM kappingini siga reglurnar, at tann vinnur, sum stóð seg betri í ólavsøkuróðrinum.

Hetta er møguleikin hjá Nólsoyinginum, men tað kann kortini ikki sigast annað, enn at tað er rættuliga sannlíkt, at tað skal eydnast Eysturoyinginum á Ólavsøku at endurvinna FM heitið.

### Nólsoyingar stýrdu

Tað var rættuliga tætt á fyrstu metrunum í Sandavági. Vestmenningurin, sum higartil í ár ikki hevur staðið seg soleiðis, sum hann hevur gjørt nógvu tey undanfarnu árini, hekk væl uppi í fyrstu tvey hundrað metrarnar og kanska reiðiliga tað. Bátarnir vóru rættuliga tættir, men kortini var tað heilt skjótt, at Nólsoyingurin legði seg framum hinar, og so megnaðu teir tað sama, sum teir og hinir vinnararnir hava megnað fyrr í ár. Havnarbáturin og Eysturoyingurin gjørdu onkra roynd at hótta fremsta plássið hjá nólsoyingum, og onkra løtuna var tað heilt tætt, men so høvdu teir umborð á Nólsoyinginum eyka orkuna.

Undan endaspurtinum fór Nólsoyingurin frá kappingarneytunum. Hann kom á mál eina bátslongd framman fyri Eysturoyingin. Millum Havnarbátin og Eysturoyingin var kappingin rættuliga stór um næstfremsta plássið. Men Eysturoyingurin var eitt lítið vet frammanfyri.

Havnarbáturin hevur ikki fingið tað burturúr árinum, sum róðurin á Norðoyastevnu legði upp til. Men teir umborð á Havnarbátinum taka kappingina í rættuliga stórum álvara, og úrslitið í Sandavági vísti, at teir hava møguleika at vera við í kappingini, og harvið hava teir við sigri á Ólavsøku møguleika at bjarga róðrarárinum. Í síðstu viku var Havnarbáturin vesturi í Vágum. Manningin koyrdi vestur og fyrireikaði seg í róðrarøkinum, har kappingin var leygardagin. Nú er Havnarbáturin aftur á Havnarvág, har teir fyrireika seg til kappingina í heimasjógvi, sum verður annan mánadag.

### Rættuliga á útivølli

Eysturoyingurin hevur vunnið tríggjar róðrar, og hann er framvegis favoritturat vinna FM. Kappingarnar higartil vísa, at tað serliga er hjá Eysturoyinginum, at tað kemur illa við, um tað er eitt sindur at í sjónum. Teir tykjast ikki trívast í øðrum enn deyðavatni, og teir trívast best í kapping á 2000 metrum og á sløttum.

Á Norðoyastevnu róðu 10–mannaførini 1500 metrar í Klaksvík. Tá vóru umstøðurnar ikki optimalar. Vindurin var nógvur ímóti, og hóast Eysturoyingurin hevði góðan endaspurt, so var tað Havnarbáturin, sum vann. Á Skálafjørðinum og Kollafirði varð róð á 2000 metrum, tað var slætt, og Eysturoyingurin var báðu ferðirnar fyrstur á mál. Á Jóansøku var málið 2000 metrar. Men tað var eitt sindur av aldu úti á 2000 metra málinum, og tað tóktist ikki líka teimum, sum frammanundan høvdu vunnið rættuliga sannførandi tvær ferðir. Í hvussu so er megnaðu teir ikki at basa Nólsoyinginum.

Í Fuglafirði var púra slætt, og Eysturoyingurin vann á 2000 metra teininum. Í Sandavági vóru ikki somu umstøður, sum tær vóru í Fuglafirði, og Nólsoyingurin vann á 1000 metrum.

Á Ólavsøku verður FM kappingin avgjørd. Málið verður 900 metrar, og tað er eingin ivi um, hvørjar umstøður teir umborð á Eysturoyinginum ynskja sær. Á Ólavsøku er oftast rættuliga slætt. Onkra ferðina er tað kortini eitt sindur ófriðarligt frá Argjalandinum og inntil bátarnir koma í lívd av Molanum, men tað valdast sjálvandi um ættina. Enn er ov tíðliga at slota eftir forsøgnum fyri kapproðrarveðrið á Ólavsøku. Men teir umborð á Eysturoyinginum ynskja sær allar aðrar ættir enn landsynning, og tí ynskinum fara øll, sum ætla sær á Ólavsøku, at taka undir við teimum í.

# Drekin er nú besta boðið

**Annar sigurin á rað hjá nýggja bátinum hjá Havnar Róðrarfelag ber við sær, at tað nú stendur upp til tær sjálvar, um tær skulu basa teimum á Argjum í FM kappingini**

5–MANNAFØR GENTUR
*Jóannes Hansen*

Tað eru framvegis fleiri boð upp á FM heitið í kappingini millum 5–mannafør við gentum. Blikur er eisini eftir Vestanstevnuna fremst í FM kappingini, men nú hava tær á Argjum rættuliga fingið kapping frá Dreka manningini, sum rættuliga hevur gjørt um seg, síðani tær fingu nýtt far at rógva í. Fyrst vann Drekin í Fuglafirði, og leygardagin vóru tær aftur fyrstar á mál. Tað hevur við sær, at Drekin bara er eitt stig aftanfyri Blik, og harvið er tað upp til Dreka manningina at gera av, um tær skulu vinna fyrsta FM heitið í gentukappingini til Havnar Róðrarfelag, uttan at tað er Sílið, sum stendur fyri tí. Sílið vann FM í fjør, og Drekin við gentumanning hevur ongantíð vunnið FM. Drekadreingirnir vunnu í 1993 og aftur í 1996 og í 1997.

Sílið, sum endaði á triðja plássinum leygardagin, og Havfrúgvin, sum gjørdist nummar fýra, hava framvegis møguleika at vinna FM. Um Sílið skal gerast meistari, so skulu tær vinna á Ólavsøku, og so skal Blikur ikki verða nummar tvey. Møguleikin hjá Havfrúnni er eftir soltna úrslitið hesa ferð nógv minni. Havfrúgvin skal vinna á Ólavsøku, og so skulu fleiri aðrir lutir ganga upp. Tað ger einki, um Sílið verður nummar tvey, tí so verður Havfrúgvin meistari við sama stigatalið sum Sílið. Men um tað skal eydnast Havfrúnni at vinna FM við sama stigatali sum Sílið, so skal onkur annar bátur enn Blikur ella Drekin gerast nummar trý, og tað er rættuliga óhugsandi.

Leygardagin var Ørnin nummar fimm í heimasjógvi. Tær vóru eina lítla bátslongd aftanfyri Havfrúnna. Junkarin og Firvaldur hildu umleið somu plássini, sum tær hava gjørt fyrr í summar. Einki var at síggja til Fípuna Føgru, sum hevur verið við í øllum hinum kappingunum. Harafturímóti var Tekla við. Hon var m. a. mannað við fleiri, sum undanfarnu árini hava sett dám á umborð á Páll Fanga, og sum nú eru komnar av flatlondum at halda summarfrí.

Sílið tóktist fáa besta startin, og eina løtu høvdu tær hug at fara tað mesta av einari bátslongd frá kappingarneytunum. Havfrúgvin fylgdi væl við fyrra partin av málinum, men sum kappingin leið, vóru tað Blikur og Drekin, sum bjóðaðu av, og hesir báðir bátarnir vunnu á Sílinum. Drekin var drúgvastur, og so er stóri spurningurin, hvussu tað verður á Ólavsøku. Blikur er framvegis fremstur, men úrslitini hjá Drekanum tvær tær seinastu ferðirnar leggja upp til, at tær eru favorittar at vinna á Ólavsøku og harvið at gerast meistarar.